Tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Ódámligir húsaprísir

## Oddagrein

PRÍSURIN á sethúsum í Havn klívur skjótt uppeftir. Tað tykist, at hann nú er líka høgur, sum hann var í áttatiárunum. Og hesa »gull-tíð« seta vit vanliga í samband við vitloysi og vanstýring. Prísurin á einum vanligum sethúsi liggur nú úr einari upp í hálvaaðru millión krónur, men í lýsingum sæst eisini, at fólk vilja hava 1,7 millión krónur fyri eini hús. – Eini hús, sum kanska kostaðu minni enn eina hálva millión krónur at byggja.

ØLL skilja, at ein vanlig familja hevur ikki ein livandi kjans at keypa eini slík hús. Tað merkir, at tað verða bara tey vælbjargaðu, og tey, sum hava eina høga løn, sum kunnu seta búgv í høvuðsstaðnum í dag. Vanlig fólk verða tí noydd at leiga sær eina íbúð, sum eisini verða leigaðar fyri okursprís ídag. Men spurningurin er, um prísurin fer upp aftur longur upp. Næsta ár fara oljufeløg at leita eftir olju. Tey hava sagt, at í leitiskeiðnum verða ikki nógv fremmand fólk her, men raka oljufeløg við olju, sum kann vinnast úr undirgrundini, verður trýstið á húsamarknaðinum størri enn nakrantíð. Tá fáa vit óivað »mjørkadalssyndromið« aftur.

ÚR einum tilvitandi sosialum sjónarhorni kann tað ikki góðtakast, at prísurin fyri býli er so høgur, at tann vanligi føroyingurin ikki hevur ráð at festa búgv – keypa sær eina íbúð ella byggja sær eini hús. Men hetta er eitt øki, sum er latið privata marknaðinum at stjórna. Føroyskir politikarar hava ikki víst hesum øki størri ans, enn at lóg er um møguleika at draga rentuútreiðslur frá í skattinum. Harafturat játtaði Løgtingið áður Húsalánsgrunninum nakrar milliónir krónur árliga. Men í dag er ikki tørvur á peningi og problematikkurin er ein annar.

HVAT kann so gerast frá politiskari síðu. Eitt stórt útboð á grundstykkjum ger, at tann himmalhøgi prísurin á privatum grundstykkjum kanska lækkar. Men tað er ikki nóg mikið. Ein annar smøguleiki er at endurskoða rentufrádráttin fyri sethúsalán. Lítið er at ivast í, at tann stóri frádrátturin ger, at prísurin er óneyðuga høgur. Verður hann lækkaður í eini skiftistíð, og ikki heimilaður fyri nýggj lán, fer prísurin óivað at lækka. Eisini eiga fíggingarstovnarnir at vera á varðhaldi, so lánspolitikkurin ikki elvir til óneyðuga høgar sethúsaprísir.

HARAFTURAT átti at verið hugt at skattalógini. Tað kann ikki verða rætt, at fólk kunnu selja eini hús, sum kanska bara eru verd 800.000, fyri hálvaaðru millión krónur, og seta alt yvirskotið á bók. Hetta er ein vinningur, sum kann sammetast við eina aðra inntøku. Tí átti hann altíð at verið skattskyldugur. Her eru nakrir tankar, sum kunnu elva til eitt orðaskifti um hetta týðandi mál fyri allar føroyskar familjur, hóast familjupolitikkur ikki hevur høga raðfesting í hesum »fullveldistíðum«.

***Sosialurin***

# Skal kortleggja havbotnin úr Føroyum til Íslands

*Rannsóknarskipið Kommandor Jack skal kortleggja leiðina á havbotninum, har ein kaðal, ið verður nýttur til telesamskifti, skal leggjast*



STEFAN Í SKORINI

Kommandor Jack kom á Havnina mánadagin og hevur nú lagt leiðina á Funningsfjørð, har arbeiðið skal byrja. Tað er eitt týskt felag, sum stendur fyri botnkanningunum.

Tað eru Føroya Tele og størsta íslendska telefyritøkan, Landsimið, ið samstarva um henda kaðalin. Við sær hevur Kommandor Jack tólv serfrøðingar úr fleiri londum, sum skulu syrgja fyri at kortleggja havbotnin, har kaðalin skal liggja.

Undir skipinum er ein kúpa, har sera viðkvama útgerðin er savnað. Við útgerðini ber til at fáa eina fullfíggjaða mynd av havbotninum í trimum dimensjónum.

Arbeiðið skal byrja á Funningsfirði á tíggju metra dýpi, og so verður hildið fram til tíggju metra dýpi á Seyðisfirði í Íslandi. Hvør metur skal kortleggjast fyri at vita, um kaðalin kann leggjast har. Uppgávan hjá Kommandor Jack er at finna ta best egnaðu leiðina til kaðalin.

**Royndir av havbotninum**

Eisini skal Kommandor Jack taka royndir av havbotninum á leiðini. Útgerð verður send niður á botn, sum treingir ígjøgnum og tekur eitt petti av havbotninum við sær uppaftur. So ber til at síggja tey ymisku jarðarløgini á havbotninum og síðani avgera, um tað er trygt at leggja kaðalin á tað slagið av botni.

Ein sera neyv leið er løgd frammanundan allan vegin av Funningsfirði til Seyðisfjarðar, og skipið skal ikki víkja meir enn ein ella tveir metrar av hesi leiðini.

Tí kunnu trupulleikar stinga seg upp, um teir møta fiskiskipum, og teir mugu víkja av leiðini. So verður neyðugt at sigla afturum aftur og gera ein part av arbeiðnum einaferð afturat.

Skipari umborð er Brian Collett úr Grimsby. Hann sigur eisini, at veðrið altíð hevur ein avgerandi leiklut, og tað kann seinka arbeiðnum. Brian hevur siglt undir Íslandi í eini 25 ár, og hann veit, at tað eisini kann verða ringt veður á tí leiðini um hesa tíðina.

Á Funningsfirði liggja nógvir aliringar, og hetta kann eisini forða arbeiðnum.

Skiparin væntar, at arbeiðið fer at taka eini tríggjar vikur, men tað veldst alt um, hvørjum trupulleikum teir møta á vegnum, so tað kann taka longri tíð.

Eftir hetta fer skipið víðari at gera somu kanningar við Isle of Man.

**Fara at bjóða arbeiðið út**

Tá ið havbotnskanningarnar eru lidnar, fara Føroya Tele og íslendska telefyritøkan at bjóða arbeiðið út til fyritøkur, ið fáast við at leggja sjókaðlar út. Um eitt nóg gott tilboð fæst, verður kaðalin lagdur út. Ætlanin er at útbjóðingin verður í ár, og arbeiðið skal byrja í vár. Kaðalin verður væntandi klárur at taka í nýtslu seint komandi ár.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, væntar tó ikki, at ætlanirnar verða lagdar á hillina. Nógvir pengar eru lagdir í verkætlanina, og tí er væntandi, at hon eisini verður fullførd. Tele Danmark hevur verið ráðgevari í fyrireikandi arbeiðnum á skriviborðinum, og nú botnurin skal kortleggjast er Tele Danmar eisini við. Kaðalin skal leggjast niður í botnin, so at trolarar ikki kunnu skaða kaðalin, tí tað er dýrt at umvæla ein slíkan kaðal.

Andras Róin sigur, at hesin kaðalin er ætlaður at styrkja um telesamskifti, sum í løtuni fer ígjøgnum væl kenda Cantan-kaðalin, ið verður umvældur í løtuni. Vøksturin í internetsamskiftinum er so stórur, at ikki er longur nóg mikið við bara einum kaðli.

- Um brek eru við Cantatkaðlinum eru stórir trupulleikar við telesamskiftinum, sum vit hava upplivað seinastu tíðina, sigur Andras Róin.

Hetta er samstundis ein liður í eini størri ætlan, har ein kaðal eisini skal leggjast til Skotlands.

# Løgtingshúsið verður ljósagrátt

*Koma stórmál fyri næstu mánaðarnar, verða tingfundirnir hildnir í leigaðum hølum í Havn*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Vit fingu ikki nýtt tinghús á hesum sinni, men kortini fer tinghúsið at síggja ørvísi út í framtíðini. Føroyska flagið verður skift út við útlendsk grót, skifer. Í næstu viku verður farið undir at umvæla tinghúsið.

-Løgtingshúsið fer at síggja nøkulunda út, sum tað sá út áðrenn umbyggingina í 1977. Vindeyguni verða skift og tey nýggju fara eisini at síggja út sum tey gomlu áðrenn umbyggingina í 1977. Húsið verður ljósari, vindeyguni hvít og útveggirnir ljósagráir, sigur Súsanna Danielsen, løgtingsskrivstovustjóri.

Roknað verður við, at umvælingararbeiðið verður liðugt seinast í september og tingið er saman hetta tíðarskeið, men ongi stórmál eru á skránni í løtuni.

- Skuldi tað hent, at okkurt mál kom fyri meðan vindeyguni vóru úr tinghúsunum, so finna vit onnur høli í býnum at halda tingfund, sigur Súsanna Danielsen, løgtingsskrivstovustjóri. Skrivstovustjórin veit ikki enn at siga hvar tingfundur verður hildin, skuldi hann verið hildin uttanfyri tinghúsið.



# 732 nýggj andlit

*Millum teir 7.400 næmingarnar, sum mánadagin aftur byrja í fólkaskúlanum kring landið, eru 732 nýggj andlit*

DIA MIDJORD

Børnini, sum á fyrsta sinni skulu í skúla, eru langt síðani byrjað at gleða seg. Tey skulu jú í holt við eitt nýtt tíðarskeið í lívinum. Tey skulu skúlast til at liva og virka í okkara samfelag.

Tað verða heili 732 nýggj barnaandlit, ið stíga um skúlans gátt mánadagin. Kring landið fara tilsamans á leið 7400 børn í skúla.

**Havnin skilir seg út**

Í Suðri er samlaða næmingatalið hækkað við 22 frá í fjør. Har fara eisini fleiri børn í 1. flokk. Sama mynstir er galdandi í Norðoyggjum og í Eysturoynni.

Men í miðstaðarøkinum er samlaða næmingatalið vaksið við 25 børnum. Men tað byrja 19 færri næmingar í 1. flokki.

Orsøkin kann vera, at nógv eru flutt til Havnar við børnum í skúlaaldri, og at tað eru nógvir næmingar, sum ynskja at halda fram í 10. flokki.



*732 børn fara á fyrsta sinni í skúla komandi mánadag*
*Savnsmynd*

# Tvístertan herjar

*Góða og heita summarið í Føroyum hevur gjørt livilíkindini hjá tvístertuni serstakliga góð*

DIA MIDJORD



– Tað má vera góðveðrið, ið hevur givið tvístertuni serstakliga góðar umstøður at nørast, heldur leiðarin á Djórasavninum.

Dorete Bloch hevur fingið hópin av fyrispurningum frá fólki, ið ikki vita síni livandi ráð, tí tey eru so nógv órógvað av tvístertu.

Eins og onnur serkøn í fakinum, vísir Dorete til eiturlakk sum bestu loysnina at sleppa av við trupulleikan.

– Hetta er insektlakk sum kann smyrjast á sokkulin og sum forðar tvístertuni at grulva inn í húsið, sigur Dorete Bloch.

Hon hevur eisini hoyrt, at fleiri stroya salt fram við húsagrundini og tað skal eisini hjálpa.

**Fer í oyruni?**

Hóast ræðusøgurnar eru nógvar, so er slettis einki at óttast.

– Tvístertan er yvirhøvur ikki vandamikil. Søgan um, at tvístertan fer inn í oyruni er íspunnin og einans pátrúgv, sigur Dorete Bloch.

Hon vísir á, at eins og onnur bangin dýr, so søkir tvístertan inn í okkurt myrkt skjól. Tískil kann ein tvísterta enda inni í onkrum oyra.

Tvístertan stingur ikki, men hon kann bíta.

– Talan er ikki um eitt álvarsligt bit, men um eitt veikt bit, sum hon ger við sínum krókum aftan, sigur Dorete Bloch.

Tvístertan hevur eisini veingir og kann flúgva.

– Men tað skal nógv til. Tað er við tvístertuni sum við meyruni. Hon klárar seg við at grulva og fæst nærum ikki við at flúgva, sigur leiðarin á Djórasavninum, sum seinastu fimtan árini hevur viðgjørt móti skaðadýrum.

# Nýtt meinigheitshús á Skála

*Fyri nøkrum døgum síðani varð farið undir at grava út fyri nýggja meinigheitshúsinum á Skála. Gongst eftir ætlan, skal húsið verða klárt at taka í nýtslu um eitt ár, sigur Sylverius Jacobsen*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um eitt ár ella so, fáa skálafólk nýtt meinigheitshús. Fyri nøkrum fáum døgum síðani var spakin settur í jørðina á stykkinum, sum liggur millum Turkihúsið, Meistarahúsini og stóra parkeringsplássið við skipasmiðjuna.

**Tørvur á nýggjum**

Sylverius Jacobsen, formaður í meinigheitsráðnum á Skála, sigur við Sosialin, at hetta er ein gomul ætlan, sum nú verður sett í verk.

- Gamla húsið er í slíkum standi, at tað krevur munandi ábøtur. Húsini eru ikki nóg væl bjálvað og so er køkurin heldur ikki serliga rúmligur, bara fyri at nevna okkurt. Húsini eru 40 ára gomul, og hildið varð rættast at byggja nýtt, sigur Sylverius Jacobsen.

Hann greiðir frá, at tað mestsum var av tilvild, at byggingin byrjaði beint nú. Kommunan er í ferð við at gera kirkjugarðin størri, men nú vóru teir varugir við, at teimum tørvaði mold. - Tí spurdu teir okkum, um teir ikki kundu taka mold hiðani, og tí høvdu vit einki ímóti, sigur Sylverius.

Hann leggur afturat, at tá teir eru lidnir er alt stykkið eftir øllum at døma grivið út, og tað lættir sjálvandi um hjá Meinigheitshúsinum, tá tey skulu undir tað veruliga arbeiði.

**Í tveimum hæddum**

Hóast arbeiðið upp á nýggja meinigheitshúsið á Skála er farið ígongd, so er enn ikki heilt greitt, hvussu húsið kemur at síggja út. Tó er greitt, at talan verður um ein bygning í tveimum hæddum, har hvør hæddin verður 200 til 250 fermetrar til víddar.

- Ein trímanna bygginevnd er sett at arbeiða við verkætlanini og tað verður hon, sum kemur at gera av, hvussu tann endaliga verkætlanin kemur at síggja út, sigur Sylverius.

Meinigheitsráðið á Skála er fíggjarliga væl fyri, og tí er ikki talan um, at nøkur fíggjarlig óráð verða tikin fyri, nú nýtt samkomuhús verður bygt í bygdini.

- Vit rokna við, at samlaði kostnaðurin fyri nýggja meinigheitshúsið verður umleið hálva aðru millión, tá alt er gjørt, og við tí, sum liggur á kistubotninum og við sjálvbodnari arbeiðsmegi er ikki so nógv eftir at fíggja, sigur hann.

**Gerðabýti við Losjuna**

Tað er nú meira av tilvild, at nýggja meinigheitshúsið kemur at standa har tað ger. Losjan Vitin á Skála átti stykkið, men sum umstøðurnar eru hjá losjuni, so vóru ikki útlit til at hon fór at byggja í bræði.

Ein gamal losjubygningur stendur mitt í bygdini, skamt frá gamla meinigheitshúsinum, men hann er í ringum standi og samstundis vil kommunan fegin hava hann tiknan niður. Vegurin niðan til brandstøðina skal gerast breiðari og skal tað verða møguligt má losjan víkja.

Tí var endin, at gerðabýti varð gjørt millum Losjuna og Meinigheitshúsið, og tað hevur við sær, at Meinigheitshúsið keypir stykkið frá losjuni, sum so keypir gamla meinigheitshúsið til losjuvirksemið. Sylverius Jacobsen er sera væl nøgdur við loysnina, tí umframt at nýggja meinigheitshúsið kemur at liggja mitt í bygdini eru parkeringsumstøðurnar sera góðar.

- Vit liggja serstakliga væl fyri, eingin ivi um tað. Samstundis hava vit atgongd til eitt stórt parkeringsøkið, so tað fær illa verið betur, sigur hann at enda.

team 85 · 31 65 11

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ...
(1 lágárstíð) 864,- fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
úr einans ...
(1 lágárstíð) 691,- fyri hvønn



Privat gisting
úr einans ...
(1 lágárstíð) 819,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo